# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Páll Vang 55 ár



Sunnudagin fyllir Páll Vang, fyrrverandi landsstýismaður, 55 ár.

Hann er sonur Jóhonnu f. Andreasen úr Fámjin og Paula Vang úr Froðba. Í 1971 giftist hann við Elini f. Jacobsen úr Norðragøtu.

Elin og Páll eiga døturnar, Barbaru, Honnu, Rakul og Elisu. Barbara er gift við Dánjali Samuelsen úr Havn, tey búgva í Havn og eiga eitt barn. Hanna er gift við Georg Kjærbo úr Sumba, tey búgva á Tvøroyri og eiga tvey børn.

Í 1973 tók Páll lærarariprógv á Holbæk Seminarium og hevur starvast sum lærari á Venjingarskúlanum í Havn, í skúlunum á Tvøroyri og Trongisvági.

Í árunum 1981-85 sat hann sum landsstýrismaður fyri Fólkaflokkin, árini 1985-2000 í býráðnum á Tvøroyri, og var hann býráðsformaður har í 7 ár.

Í 1999 gjørdist Páll álvarsliga sjúkur og avlamin. Hann býr nú á eini deild hjá sjúkrahúsverkinum fyri heilaskadd. Hóast hann neyvan kemur at vinna fullan førleika aftur, so gongur framá hjá honum. Í dag hevur hann tað so gott, sum tað eftir umstøðunum letur seg gera.

Elin hevur verið manni sínum ein hollur stuðul gjøgnum lívið, ikki minst nú, síðani hann gjørdist sjúkur. Eisini døturnar og øll teirra hava stríðst fyri, at Pálli, hóast sjúkuna, kann hava eitt gott lív.

Vit ynskja Páll hjartaliga tillukku á føðingardegnum og Harrans signing framyvir.

## Nósabarnaprix í nýggjum skapi

**Í heyst verða árligu songkappingarnar fyri børn undir heitinum Nósabarnaprix hildnar í SMS í Havn. Fyrr hava undankappingar verið kring landið, men so verður ikki hesaferð, siga James Olsen og Mark Joensen, sum skipa fyri tiltakinum**

NÓSABARNAPRIX
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*



*Nósabarnaprixkappingarnar verða í ár allar í SMS í Havn. Tað verða tríggjar undankappingar, hvør við tíggju luttakarum*

Nósabarnaprixkappingarnar verða í ár allar í SMS í Havn. Tað verða tríggjar undankappingar, hvør við tíggju luttakarum.

Fyriskiparanir hava gjørt fleiri broytingar í samband við kappingarnar, bæði fyri at gera tað barnavinaligari, men eisini fyri at tiltakið skal verða lættari at skipa.

– Tað er trupult og krevur nógva fyrireiking og arbeiðsorku at ferðast kring landið við tiltakinum. Tað er jú ein hópur av teknikki, sum skal flytast aftur og fram, so tað er ikki bara sum at siga tað, siga fyrireikararnir.

Tí verða øll umførini nú hildin í SMS. Tey verða klokkan fýra seinnapart, soleiðis at fólk kunnu verða heima aftur fyri náttúrðatíð og eisini fyri teirra skuld, sum hava bát at hugsa um, tá tey skulu heimaftur.

Frásøgufólk til kappingarnar hesa ferð verður Kári Sólstein. Seinni fara vit at hoyra meira um treytirnar, og um hvussu kappingarnar, sum verða í oktobur, verða skipaðar. Finalan verður fyrst í desembur mánaða.

Aftur í ár er tað Føroya Banki, sum høvuðsstuðlar barnasongkappingina. Aftrat Føroya banka eru SMS og Burger King stuðlar hjá Nósabarnaprix.

VIÐMERKINGAR

## Hvat sigur Javnaðarflokkurin nú!

**Bill Justinussen,**
*tingmaður fyri Miðflokkin*



Lítla smádrongurin Petur, hvørs lagna í mánaðir hevur til viðgerðar alment, bæði í fjølmiðlunum og í Løgtinginum, umboðar í veruleikanum hin máttleysa móti maktini. Hansara lagna liggur í hondunum á fremmandum í øðrum landi, og føroysku myndugleikarnir megna ikki at geva honum ta verju, sum eitt og hvørt barn hevur rætt til. Vit kunnu látast at vera eitt land, har barnavernd, familjupolitikkur og annað gott sigst at vera í hásæti, men tá so veruleikin so náðileyst talar ímóti, raplar korthúsið. Eisini heimurin hjá lítla Peturi raplar, og tey, sum geva honum tryggleika, tey, sum hann er allarbest við og sum eru allarbest við hann, mugu sleppa takinum.

### Javnaðarfloksins skomm

Javnaðarflokkurin hevur sagt seg vera fremsta borgan fyri verju av slíkum sjálvsøgdum rættindum. "Krev tín rætt" er herrópið. Tað hevur familjan hjá Peturi gjørt. Men tey fáa ongan rætt. Hevði hetta málið komið upp í farna samgonguskeiði, tori eg illa at ímynda mær tær ábreiðslur, tær dagligu forsíðuyvirskriftir í Sosialinum og tær hvøssu atfinningar í Løgtinginum, sum Javnaðarflokkurin hevði borðreitt við mótvegis okkum, sum tá sótu á bleytu málunum í landsstýrinum. Men nú hoyrist onki. Sum afturlatnar øður tykjast hvørki Javnaðarflokkurin ella Sosialurin at hava eina einastu viðmerking um vanlukkuligu støðu Peturs. Dimmalætting hevur í blaðnum 6. august drúgvar og hvassorðaðar viðmerkingar um málið, men ikki eitt einasta orð í Sosialinum sama dag, hóast eg onga løtu ivist í, at tíðindafólkini har eisini vita um støðuna hjá lítla Peturi. Blaðið sigst vera óheft og ópolitiskt og sigur seg dagliga borðreiða við tí mest aktuella. Oddagreinin í dag 6. august snýr seg um nullhugsjónina. Hvat aktuelt er í nullhugsjónini, tá lítli Petur saman við familjuni eirindaleyst verða syndrað møguliga fyri alla framtíð. Kanska er null hugsjón eftir í Javnaðarflokkinum? Er tað fyri at verja ein landsstýrismann heldur enn sakleysa og hjálparleysa smádrongin, ella er tað fyri at fjala út yvir skommina??

### Barnavernd

Mín fatan er, at løgfrøðisligir frumskógir ongantíð mugu gerast ein forðan fyri rættvísi, viti og skili. Allar lógir eiga at finna sítt grundarlag í rættvísi, næstrakærleika og sunnum skili, og eru eftir míni sannføring gjørdar við tí endamáli at verja tann veikara. Í hesum føri tykist sum at lógirnar verða nýttar til at handhevja rættin hjá hinum sterkara. Fremsta uppgáva landsstýrismansins í barnaverndarmálum má vera at tryggja, at øll børn, sum eru í Føroyum, fáa vernd, uttan mun til tjóðskap og uppruna. Uppgávan má vera at verja børnini, so leingi, sum tey eru á føroyskum øki, tí tey megna ikki at verja seg sjálvi. Løgfrøðisliga veit eg ikki, um hetta heldur, men menniskjansliga er tað rætt. Um vit hugsa okkum, at eitt barn kom til Føroya úr einum fjarskotnum landi, t.d. Kina, og umstøðurnar gjørdust so, at barnið hevði tørv á barnavernd, so meti eg ikki, at landsstýrismaðurin hevði valt at sent barnið aftur til Kina, tí ein ávís kommuna í eitt nú Henan landslutinum hevði kravt tað. Ella hvussu?

### Tingið í summarfrí

Eg skilji ikki, at tingið skal hava summarfrí í nógvar mánaðir. Munnligir og skrivligir fyrispurningar á tingi eru eitt tað besta amboðið til tess at tryggja, at andstøðan fær hildið eitt vakið eyga við landsstýrinum. Um fyrispurningar høvdu verið á skránni í summar, hevði landsstýrismaðurin uttan iva verið trápurdur, og hevði hann samstundis kunnað fingið ríkiligt av undirtøku frá tingmonnum fyri at gera tað, sum skal til fyri at hjálpa lítla Peturi og familjuni. Var tað hetta, Javnaðarflokkurin skuldi brúka maktina til? Flokkurin sigur seg vera verja teirra veiku, verja smámansins og barnanna. Men nú er hann vorðin amboðið hjá donskum myndugleika at taka verjuleysa smádrongin frá familjuni, og Sosialurin er vorðin verji hjá landsstýrismanninum heldur enn hjá lítla Peturi.

VARPIÐ
Skráir og ummælir
16 síður
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2






# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*19. oktober 2003 fingu Alma og Morten Holm Pedersen eina dóttur. Her situr ein stoltur Hans Martin við lítlu systur síni, hon eitur Sophia. Tey búgva øll í Keypmannahavn.*

*28. juli fingu Súsanna Holm og Magni Mohr, Tórshavn, henda avbera vakra og fitta sonin.*



*18. juli fingu Birita Rasmussen, Oyndarfirði, og Hans Marius Hansen, Leirvík, ein son. Hann vigaði 4250g og var 57 cm langur.*



26. juli fingu Anja Joensen og Jan Haldansen, Vági, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4410 gr.

27. juli fingu Tóra og Hans Toftegaard, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3800 gr.

29. juli fingu Winnie og Ásbjørn Kjærbo, Skopun, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4950 gr.

30. juli fingu Gerda Johannesen og Dánial Nolsøe, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3000 gr.

30. juli fingu Katja Lervig, Leirvík, og Karsten B. Sørensen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4150 gr.

31. juli fingu Arngerð Diana Hansen og Jan Joensen, Argjum, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3650 gr.

31. juli fingu Margaret og Høgni Setberg, Galt, California, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3600 gr.

1. august fingu Selma og Dávur R. Hansen, Toftum, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3650 gr.

2. august fingu Jenny í Gong og Jóanes Joensen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4300 gr.

2. august fingu Rúna Dalsgarð og Jakob Jónsson, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 4250 gr.

3. august fingu Nicolina Gjógvará og William West, Tórshavn, ein son. Hann var 59 cm langur og vigaði 4100 gr.

3. juli fingu Tórunn Højgaard Ósá og Elmar Ósá, Frederiksberg, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3850 gr.

## Dagurin

**7. august. Donatus**, deyður umleið 380. Drongurin Donatus misti bæði foreldrini, og undan forfylging flýddi hann til Arezzo í Italiu. Varð prestlærdur og endaði sum biskupur har á staðnum. Seinni varð hann tikin og hálshøgdur.

**8. august. Rut**. Dagurin vígdur minninum um kvinnuna, sum Rutarbók í Gamla testamenti er skrivað um.

Týdningurin av bíbilska navninum er ókendur, kanska merkir tað *vinkona* ella *trúgv*.

**9. august. Romanus**, deyður umleið 250. Halgisøgurnar eru ikki á einum máli, um hann var ein umvendur rómverskur hermaður ella ein kristin prestur. Hálshøgdur varð hann í hvussu so er fyri trúar sakir.

## Andlát

22. juli
Katrin Rein, 57 ár.

30. juli
Øssur Bech, Porkeri, 55 ár.

31. juli
Anna Maria Nattestad, vanliga nevnd Válamia, 91 ár.

1. august
Elsa Maria Jacobsen, vanliga nevnd Essemi í Tórshavn, 90 ár.
Marna Sivertsen, fødd Olsen, búsitandi á Argjum, 79 ár.

3. august
Thurid Andreasen, fødd Samuelsen, Klaksvík, 84 ár.

4. august
Petur Sofus Juul úr Søldarfirði, vanliga nevndur Piddi, 70 ár.

## Brúdleyp

Í dag, 7. august, kl. 14.00 giftast í Kirkjubøar kirkju Debora Hjelm, Vági, og Niels Nielsen, Sørvági. Brúdleypið verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 18.00.

Í dag, 7. august, kl. 14.00 giftast í Kollafjarðar Kirkju Sólvá í Homrum úr Kollafirði og Jógvan Egholm úr Vestmanna. Veitslan verður hildin í Ítróttarhøllini í Vestmanna kl. 19.00.

Í dag, 7. august, kl. 17.00 giftast í Dómkirkjuni Jóanna Djurhuus, Tórshavn, og Niels Petur Jacobsen, Nes, Vágur. Veitslan verður fyri innbodnum í Sjónleikarhúsinum kl. 19.00

Í dag, 7. august, kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Nanna Hentze Rasmussen, Tórshavn og Harry Knudsen, Saltangará. Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl. 19.00.

Í dag, 7. august, kl. 15.00 giftast í Fuglafjarðar kirkju Bára Sólheim Thomsen úr Fuglafirði og Jan Andrew Guttesen úr Havn. Veitslan verður fyri innbodnum í Mentanarhúsinum í Fuglafirði kl. 18.30.

Í dag, 7. august, kl. 15.00 giftast í Havnar kirkju Akiko Iwazawa frá Japan og Ragnar Waagstein úr Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum í Róðrarneystinum á Argjum.

Í dag, 7. august, giftast í Klaksvík Mette Gade frá Glyngøre og Leif Berg Jacobsen úr Klaksvík. Vígslan verður í Betesda kl. 15.00. Vælkomst verður á Hotel Norð kl. 19.00.

Í dag, 7. august, kl. 11.00 giftast í Skopunar kirkju Jóna Petra Thomsen, Skopun, og Jóhan Mikkelsen Sørvágur.

Í dag, 7. august, kl. 15.00 giftast í Sjóvar kirkju, Judith Fríða Ellingsgaard, Strendur, og Jørgin Thomsen, Skáli. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00.

Í dag, 7. august, giftast í Vedsted Kirke Janette Kjær Rasmussen, Over Jerstal og Tórhallur Reinert úr Norðradali. Brúdleypsadr.: Ved Majen 9, Over Jerstal, DK-6500 Vojens.

## Prógv

1. august fekk Rannvá Hentze Davidsen av Argjum prógv sum bioanalytikari á Hvidovrehospitali.

## Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu, tá

**Paul Kjerstad**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar og fyri gávur
til Eldrasambýlið.
Ein serstøk tøkk til tykkum, sum vóru um Paul.

*Familjunnar vegna*
**Jonna**